# Starv á Menningarstovuni

Til tess at styrkja ráðgevingarførleikan í útflutningsviðurskiftum á Menningarstovuni (Faroe Islands Trade Council) verður starv við hesum lýst leyst at seta 1. oktober 2002 ella skjótast gjørligt.

Arbeiðið umfatar uppsøkjandi tørvs- og marknaðarkanningar, upplýsing um marknaðarmøguleikar og føroyska vinnu, skeiðsvirksemi, útflutningsátøk og kunningarferðir v.m.

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum, at hon/hann, ið sett/ur verður, hevur ástøðiligan, akademiskan førleika í altjóða handli ella líka útflutningskenda útbúgving, vinnuligar royndir og hevur í verki sýnt kreativ avrik á hesum øki.
Tað er ein fyrimunur, at tann setti hevur innlit og kunnleika um traditionella føroyska vinnu, men við vinnupolitiska setninginum um nýggjar vinnur verður størri dentur lagdur á førleika/kunnleika til altjóða marknaðin av hesum vinnum.

**Setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti verða sbrt. avtalu millum avvarðandi fakfelag og Fíggjarmálastýrið ella avtalu, ið kann góðkennast av Fíggjarmálastýrinum.

Umsóknir um starvið verða at senda Menningarstovuni, att.: Áki Johansen í seinasta lagi 10. september 2002. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Áka Johansen.

**Menningarstovan**
Faroe Islands Trade Council
Bryggjubakki 12
Postrúm 259
FO-110 Tórshavn.
Tlf. +298 35 31 00
Fax +298 35 31 01
e-mail: aki@trade.fo

Lóg og reglugerð fyri Menningarstovuna áseta, at Menningarstovan skal stuðla menningini av føroyskum ídnaði, handverki og tænastuvirksemi við ráðgeving innan tøkni, búskap, leiðslu og útflutning og fyriskipan og luttøku í vinnu-fremjandi átøkum innan nevndu øki. Við at byggja brýr millum politiska viljan og vinnuna um vinnumenning eigur virksemið serliga at vera málrættað ímóti

- átøkum, sum menna útflutningsførleikan hjá føroyskum fyritøkum
- skipaðari menning av ávísum vinnugreinum og nýggjum vinnugreinum
- at seta ávís menningarøki í brennidepilin
- menning av vinnuligum undirstøðukervi

Í løtuni starvast 4 fólk á stovuni.

# Toyota Hiace til sølu

Diesel, 3 ára gamal, koyrt uml. 50.000 km.

**Tlf. 315130**

# Gott innbúgv til sølu

So sum sofa, borð, stólar,reolir, sengur, lampur og køksbúnýti.

Vit hava opið hús leygardain 24/8 frá kl. 12.00-18.00

Kristian Guttesen
Inni á Fjørð, Vestmanna
Tlf. 424267

**Brandt**
**Blomberg**
**Hvítvørur til føroyska húsarhaldið**




6 kg turr klæðir
600-1600 snúningar
prísur fyrr 6.295.-
**Nú 5.595,-**

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

## Útbjóðing

Vegna Tórshavnar Havn skulu vit við hesum bjóða arbeiðið viðv. høvuðsumvæling av havnarøki millum Farstøðina og goymsluhøllina hjá Eimskip út í almenna lisitatión.

Havnarøkið er til støddar uml. 3.800m2

Arbeiðið snýr seg í høvuðsheitum um:

-Grevstur og burturkoyring av verandi lendistilfari, sum er asfalt og betongvegir v.m.
-Regnvatnsfráveiting, kloakkarbeiði og annað leiðingsarbeiði.
-Útlegging av grót- og skervtilfari sum, undirlag fyri asfalti.

Útbjóðingartilfari fæst ímóti veðhaldi kr. 2000,- frá SP/F Protek, postrúm 331, 110 Tórshavn.

Tilboðini skulu latast inn í afturlatnum brævbjálva merktur:

Havnarøki sunnan fyri Farstøðina.

**Innkomin tilboð verða latin upp á skrivstovuni hjá Tórshavnar Havn mikudagin 11.09.02 kl. 11.00 og kunnu teir, sum bjóða verða hjástaddir.**

SP/f Protek, ráðg. verkfr.
Postrúm 331
Vaglið
110 Tórshavn
Tel. 319321 - Fax 319331

HESTPRENT



**BØKUR, BØKUR, BØKUR**
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3424
Navn: Sp/f SERV YOU

Adressa: 530 Fuglafjørður

Kommuna: Fuglafjarðar Kommuna
Stovningardato: 16.08.2002
Viðtøkudato: 16.08.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Leif Andersen, Kirkjuvegur 8, 530 Fuglafjørður.
Stjórn: Leif Andersen, Kirkjuvegur 8, 530 Fuglafjørður.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 16.08.2002 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at fáast við lýsingarvirksemi, marknaðarføring og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 20. august 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2485, P/F Kjartan Joensen, 520 Leirvík.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Hans Andersen, Skelsager 15, Faurskov, 5560 Årup.
Innkomin í nevndina: Jørgen Heinrich Bast, Rybebakken 20, DK-5210 Odense NV.

Skráseting Føroya tann 20. august 2002

Kristin Balle



# - Landarar!!!

P/F SNODD á Toftum, søkir eftir fólki, at landa og til annað fyrifallandi arb., brúk er fyri røskum og dugnaligum fólkum at byrja beinanvegin.

Áhugaði kunna venda sær til:

| | |
|---|---|
| Skrivstovuna | 44 99 94 |
| Dánial | 21 25 60 |
| Jóhannus | 21 70 60 |

www.SNODD.fo

Tel. +298 44 99 94 - Fax. +298 44 91 19 - e-mail. snodd@snodd.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2726, P/F Norðis Seafood, 470 Eiði.

Viðtøkur broyttar: 29.01.2002.
Nýtt navn: P/F Norðis

Skráseting Føroya tann 20. august 2002

Kristin Balle

# Sølufólk

Vit søknast eftir fólki til gólvdeildina í Vøruhúsinum á Hjalla. Arbeiðið umfatar avgreiðslu av kundum og annað fyrifallandi arbeiði.

Nærri upplýsingar á tlf. 342500 ella 216755, Sólbjørn.

Skrivliv umsókn innan 31. aug. verður at senda til:

LITAVAL P/F
Postboks 1019
110 Tórshavn
st@litaval.fo

# Opel Vectra til sølu



Opel Vectra 2,0 Tdi frá 2000. Koyrt 31.000 km. Hevur klimaanlegg, CD-spælara o.m.a. 2 sett av dekkum fylgja við – einar 17" v/ summardekkum og einar 16" v/ vetrardekkum.

Verður seldur um nóg høgt boð fæst.

**Tlf. 210888**

www.sosialurin.fo

Sosialurin

## Frá Norðoya Javnaðarfelag

Aðalfundur felagsins verður hósdagin 5. september kl. 19.30.

**Nevndin**

# Leiga av ítróttarhøllini

## í Runavík

Tey, ið ætla at leiga ítróttarhøllina í Runavík veturin 2002/2003, skulu senda skrivliga umsókn til býráðsskrivstovuna í seinasta lagi 30. aug. 2002.

**Runavíkar býráð**